# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*– Enn er einki endaligt komið uppá pláss, men um tað gongst eftir ætlan, so verður Stephan Mølvig partur av manningini hjá Klaksvíkingi komandi kappingarár.*
*Jóhan Petur Jacobsen, Klaksvíkar Róðrarfelag*

Kyndil-Neistin:

## Bæði skulu fáa gongd á

**Bæði Kyndil og Neistin hava brúk fyri báðum stigunum, tá liðini møtast í Atlantic Airways deildini hjá monnum sunnudagin. Nú fáa tey eisini høvi at leggja rokdystin síðst í desember aftur um seg**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*Brakið um Havnina verður aftur á skránni í vikuskiftinum, tá Kyndil og Neistin bresta saman.*

Seinast Kyndil og Neistin møttust, endaði alt í einum ræðiligum ruðuleika. Dómarar, leikarar, hjálparfólk og áskoðarar vóru mest sum í einum roki, og endin av tí heila var, at rokið bleiv flutt yvir á skrivaraborðið hjá Hondbóltssambandinum. Her bleiv Hans Áki Dal Christiansen fyrst dømdur leikbann í tríggjar dystir av kappingarnevdini, men seinni bleiv dómurin ógildaður av dómsnevndini.

Nú møtast tey bæði havnarliðini so aftur í 2. umfari av endaspælinum. Undan dystinum liggur Neistin á triðja plássi, meðan Kyndil liggur aftast í bestu mansdeildini.

Gongdin hjá teimum báðum hevur ikki verið tann besta síðstu dystirnar. Bæði fingu eina keðiliga byrjan uppá endaspælið, tá Kyndil tapti fyri H71, meðan Neistin tapti fyri KÍF, so nú ræður um hjá báðum at finna rætta stevið aftur, soleiðis at tey kunnu fáa nøkur stig inn á kontoina.

**Neistin hevur havt munin**

Tvær ferðir møttust hesi bæði liðini í grundspælinum, og samanumtikið hevur Neistin havt munin á teimum grønu. Fyrra dystin vann bláa havnarliðið nevniliga trygt, meðan seinna dysturin endaði við javnleiki. Undan dystinum má Neistin tó metast at vera favorittur, men nú fær Kyndil so ein triðja møguleika at royna at vinna á Neistanum í ár. Vinna teir dystin, so kunnu teir leggja seg ájavnt við Neistin, men vinnur Neistin dystin, so er Kyndil rættiliga afturúr siglt í stríðnum um heiðurmerki.

StÍF-H71:

## Eingin Finnur

**StÍF má leika uttan toppskjúttan, Finn Hansson, tá teir taka ímóti H71 í Atlantic Airways deildini sunnudagin. Vinnur H71 dystin, so fanga teir StÍF aftur á stigatalvuni**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Mikudagin misti StÍF eitt av sínum týdningarmestu vápnum til komandi dystin, tá Finnur Hansson bleiv rikin av vølli fyri at hava rakt málverjan í høvdið, so nú mugu strandingar vera hann fyri uttan í týdningarmikla dystinum í Atlantic Airways deldini ímóti H71.

Undan dystinum liggur StÍF á øðrum plássi, meðan hoyvíkingar liggja á fimta plássi, men munurin liðini er bara tvey stig, so vinnur H71 á StÍF sunnudagin, so kunnu teir leggja seg undir liðina á strandingum.

Hesi bæði hava møtt hvørjum øðrum tvær ferðir í grundspælinum. Fyrri dysturin, sum var í Hoyvík, endaði við javnleiki, meðan strandingar hølvaðu H71 av í seinna dystinum inni á Skála. Nú hittast tey so aftur á Skála, og enn einaferð má StÍF metast at vera favorittur. Hesa ferð leika teir tó uttan ein av bestu spælarunum, Finn Hansson, og so er spurningurin, um hetta fer at geva teimum trupulleikar.

KÍF-VÍF:

## KÍF skal steðga oddaliðnum

**Mikudagin var KÍF nær við at steðga oddaliðnum í Coca Cola-kappingini. Nú fáa teir ein nýggjan møguleika, tá VÍF kemur á vitjan í Atlantic Airways deildini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

VÍF hevur ligið klárt á odda í Atlantic Airways deildini at kalla alt kappingarárið. Fyrstu tríggjar dystirnar høvdu teir smávegis trupulleikar, men eftir hetta hevur bert gingið tann rætta vegin hjá vestmenningum, sum hava vunnið 8 dystir á rað í landskappingini undan dystinum ímóti KÍF.

Hevur gongdin hjá vestmenningum verið góð, so kunnu vit ikki siga júst tað sama um KÍF. Ikki tí, KÍF hevur fingið fleiri stak góð úrslit í ár, men teirra avrik hava bara verið heldur óstøðug. Tí liggja teir eisini á einum 4. plássi, men síðstu dystirnar hava kollfirðingarnir víst, at teir ætla sær enn longur upp eftir stigatalvuni. Í fyrsta dystinum í endaspælinum vunnu teir trygt á útivølli fyri Neistanum, meðan teir taptu tepurt í fyrra hálvfinaludystinum í Coca Cola-kappingini, tá teir vitjaðu í Vestmanna mikudagin.

**Skaðar plága liðini**

Tá liðini spældu mikudagin, mangladu bæði liðini onkrar av profilunum. Hjá VÍF var høgri vongurin, John Zachariassen, ikki við, meðan útlendski málverjin, Dejan Lacok, heldur ikki var partur av liðnum. Tað er sera ivasamt, um nakar av hesum verður tøkur til dystin sunnudagin.

Eisini KÍF manglaði onkran leikara. Mirko Milinkovic er úti við skaða, og hann verður ikki tøkur til dystin sunnudagin. Karl Johan Djurhuus hevur eisini verið skaddur í næsan ein mánað, men hann var aftur við í hópinum, tá liðini møttust í Vestmanna mikudagin. Harafturat hevur KÍF mist bæði Arnbjørn Hansen og Petur Martin Poulsen, sum neyvan vera við aftur fyribils.

Sjálvt um liðini hava verið illa rakt av avboðum, so leiktu tey ein góðan dyst í Vestmanna mikukvøldið, so áhugaði kunnu vænta ein javna og spennandi dyst í høllini í Kollafirði sunnudagin.